# Kunnu læra av samstarvinum

**Íslendingar kunnu læra av samstarvinum millum danska og føroyska tjóðsavnið, heldur Íslendski forsætisráðharin. Hann sigur, at føroyingar kunnu vera ernir av Fornminnissavninum. Íslendingar eru sera ernir av teirra gomlu hondskriftum, sum heim aftur eru komnar, og forsætisráðharrin heldur, at føroyingar sanniliga eisini hava nógv at fegnast um, nú okkara fornminni eru at finna í teirra rætta umhvørvi, sum hann tekur til**



*Arne Thorsteinsson greiðir forsætisráðharranum við fylgi frá Fornminnissavninum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

ALMENN VITJAN
*Edvard Joensen*

**Hoyvík:** –Tað var áhugavert at síggja Kirkjubøstólarnar í Føroyum, segði Dávíð Odsson, íslendskur forsætisráðharri, tá hann vitja Fornminnissavni í Brekkutúni í Hoyvík.

–Eg havi hoyrt um hesar fornlutirnar, men havi ongantíð sæð teir fyrr. So tað var stuttligt at síggja teir í sínum rætta umhvørvi, nevniliga á einum føroyskum savni, segði hann.

Hann vísti á, at íslendingar eru ernir av teirra tjóðargripum, gomlu hondskriftunum, sum komnar eru heimaftur. Og hann hann fegnaðist um, at tað bar til at fáa tær aftur frá danska tjóðsavinum.

Íslendingar hava ongan rætt at krevja nakað aftur frá dønum, segði hann, men vónaði tó, at tað heldur ikki fór at verða neyðugt. Hann setti álit á samstarv teirra millum, sum hava skil á slíkum.

Men hann helt kortini, at tað var ikki sørt, at íslendingar kundu læra av føroyingum og dønum í júst hesum málinum við millum øðrum Kirkjubøstólunum. Tí hetta er fyrimyndaligt samstarv, helt íslendski forsætisráðharrin.

## Liva av havinum

Íslendingar halda, at teir eiga at standa uttan fyri ES, sigur forsætisráðharrin.

Ísland hevur eina handilsavtalu við ES, sum í síni tíð var sera góð, vísir hann á.

Men Ísland er fiskivinnutjóð, og við tí fiskivinnupolitikki, ES í

dag hevur, ber ikki til hjá Íslandi at gerast limur í felagsskapinum, hóast Ísland roknar seg sum part av europeiska økinum, staðfestir Dávíð Oddsson, íslendskur forsætisráðharri.

Hvussu føroyingar skulu fyrihalda seg, ella um hann hevur nøkur góð ráð at geva føroyingum soleiðis, heldur hann, at tí fara føroyingar nokk at finna út av sjálvir.

Tað er annað enn fiskur í havinum, og íslendigar halda, at tað skal gagnnýtast, sum kann. Eitt nú hvalurin, sum svimur í íslandskum sjógvi.

–Tað er heilt galið, at størru tjóðirnar ikki skilja, hvussu umráðandi tað er fyri Ísland og onnur lond her í Norðurhøvum, at vit gagnnýta tað, í havinum býr, tí tað er okkara tilfeingi, sum okkum er givið, og tí noyðast vit at liva av, so leingi vit eru her, sigur íslendski forsætisráðharrin.

## Almenn vitjan

Íslendski forsætisráðharin er á almennari vitjan í Føroyum. Vitjanin byrjaði við eini stuttari arbeiðsvitjan mikukvøldið, tá hann var á útnorðurfundi saman við føroyska løgmanninum og grønlendska landsstýrisformanninum.

Í gjár bygjaði almenna vitjanin í Løgtinginum, har Edmund Joensen, løgtingsformaður, tók ímóti.

Seinni fyrrapartin varð farið niðan til Hoyvíkar at vitja Fornminnissavnið, har Símun Arge, landsantikvarur, tók í móti, og Arne Thorsteinsson, fyrrverandi landsantikvarur, greiddi frá savninum.

Tórshavnar Býráð var vertur við morgunmat á middegi, og seinnapartin hitti forsætisráðharrin íslendingar, sum búsitandi eru í Føroyum.

Dagurin endaði við døgurða í Havnar Klubba, har Anfinn Kallsberg, løgmaður, var vertur.

Í dag vitjar forsætisráðharrin eftir ætlan í Suðuroy. Farast skuldi av Havnini við Brimli klokkan trý korter til níggju, og tíðindafundur skuldi vera umborð á veg suður.

Í Suðuroy verður vitjað í Vági, har býrðáðið er vertur við morgunmat, og vitjað verð á Atlantic Seafood.

Flogið verður við tyrlu úr Froðba á flogvøllin, haðani farið verður avstað aftur við Atlantsflog til Íslands klokkan 17.30 í kvøld.



*Íslendski forsætisráðharrin varð hjartaliga móttikin á flogvøllinum*
*Mynd: Edvard Joensen*



*Símun Arge, landsantikvarur, tók í móti á Fornminnissavninum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 23. august til hósdagin 29. august**

| Fríggjadagur | Leygardagur | Sunnudagur | Mánadagur | Týsdagur | Mikudagur | Hósdagur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 18.30 Likkulikkuleia | 20.35 Richie Rich | 20.00 Tann langa ferðin | 20.20 Flogsjúkur | 18.30 Boyggi | 21.25 Dirty Dancing | 20.50 Ally McBeal |
|  |  |  |  |  |  |  |
| 20.00 Psykisk terror | 19.00 Waterboy | 17.30 Heksene fra Warren Manor | 19.35 Hestehviskeren | 20.35 Boyz N' the hood | 20.05 Den onde cirkel | 21.40 Bloodline |
|  |  |  |  |  |  |  |

## Fríggjadagur 23. august

**SVF**

18.30 Likkulikkuleia 26
19.00 Minty og Melanie 7:13
19.25 Gesturin e
20.00 Dagur og Vika
20.20 Íbúðin verður broytt
20.45 Gekkur
21.25 Smá undurverk - amerikanskur filmur
23.25 Dómadagstiltøk 1:2 - amerikonsk stuttrøð - Óhóskandi fyri smábørn
0.55 Liðugt

**EUROSPORT**

07:30 Sailing: Sailing World
08:00 Olympic Games: Olympic Magazine
08:30 Rally: World Championship Germany Brno
09:00 Football: European Championship Euro 2004
11:00 Football: European Championship Euro 2004
11:45 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
12:15 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
13:00 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
14:15 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
15:15 Canoeing (Live): World Championship France Bourg Saint Maurice
17:45 News: Eurosportnews Flash
18:00 Tennis (Live): Wta Tournament New Haven United States
19:30 Athletics (Live): Iaaf Grand Prix I Meeting London United Kingdom
22:00 News: Eurosportnews Report
22:15 Fencing: World Championship Portugal
23:15 Rally: World Championship Germany Brno
23:45 Xtreme Sports: Yoz Mag
00:15 News: Eurosportnews Report

**BBC PRIME**

0.00 TLZ: »Tobacco Wars – Lighting Up«
1.00 TLZ: »Supernatural Science – Electric Hands«
2.00 TLZ: »Pink Parents«
3.00 TLZ: »Back to the Floor – Ambulance«
3.30 TLZ: »The big Deal – Headhunter«
4.00 TLZ: »Oceanography«
4.50 TLZ: »Sounds – What have the 90's ever done for us?«
5.00 TLZ: »Buongiorno Italia! – Rivediamo Un Po'«
5.30 TLZ: »Starting Business English«
6.00 Just So Stories: »How the Alphabet Was Made«
6.10 Just So Stories: »The Crab that played wth the Sea«
6.20 Playdays: »Tent Stop«
6.40 Superted
6.50 Superted
7.00 Smart
7.20 The Really Wild Show: »Scotland«
7.45 Garden Invaders
8.15 House Invaders: »Dorridge«
8.45 Antiques Roadshow: »The Next Generation« (Childrens Special)
9.15 Charlie's Garden Army: »Manchester«
9.45 Gardeners' World
10.15 The Weakest Link
11.00 To the Manor Born
11.30 Holiday Swaps: »Canada Skiing/Egypt Diving«
12.00 Eastenders
12.30 Miss Marple: »A Caribbean Mystery« Part 2
13.30 Garden Invaders
14.00 Just So Stories: »How the Alphabet was Made«
14.10 Just So Stories: »The Crab that played with the Sea«
14.20 Playdays: »Tent Stop«
14.40 Superted
14.50 Smart
15.15 The Really Wild Show: »Scotland«
15.45 Lovejoy: »Never Judge a Book by its Cover«
16.45 Natural Comparisons
17.45 The Weakest Link
18.30 Liquid News
19.00 Parkinson: »Samuel L. Jackson, Robbie Coltrane«
20.00 Suddenly Last Summer
21.30 Later With Jools Holland: »Bjork, Charlatans, Mica Paris«
22.30 Top of the Pops Prime
23.00 Totp Eurochart
23.30 Dr. Who: »The Five Doctors«

**BBC WORLD**

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Talking Movies (r)
02:00 BBC News
02:30 Life (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Talking Movies (r)
09:00 BBC News
09:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Life (r)
11:00 BBC News
11:30 Asia Today
11:45 World Business Report
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Talking Movies (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Mary Anne's Bikes (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Seven Days That Shook The Planet
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Correspondent
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**3**

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:15 Tv-Shop
09:20 Ricki Lake
10:10 Horton-Sagaen
11:00 Horton-Sagaen
11:55 Ricki Lake
12:50 Familien Walton
13:45 Hop Med Professoren
15:35 The Ellen Show
16:05 Ricki Lake
17:00 Alle Elsker Raymond
18:00 Med På Moden
18:30 Alle Tiders Barnepige
19:00 Interne Affærer
20:00 Psykisk Terror
21:45 Hemmeligheder
23:35 Sexorama
00:05 Walker Texas Ranger
01:05 Når Tiden Udløber
02:50 Det Hjemsøgte Hotel
04:30 Godnat

**ÚF**

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Harriet Lamhauge í Lamba lesur
7.15 Morguntónleikur
7.30 Tíðindi
7.35 Góðan morgun Føroyar
8.00 Tíðindi
8.03 Góðan morgun Føroyar
9.00 Tíðindi
9.03 Garpatáttur (e) - Hans Tórgarð lesur 18. part av skaldsøgu eftir Halldór Laxness, sum Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs hava týtt.
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Harriet Lamhauge í Lamba lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Máltráðurin
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum - Gunnvør Poulsen leggur til rættis.
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Í víngarðinum (e) - Alexander Samuelsen stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Barometrið
16.00 Tíðindi
16.03 Barometrið
17.00 Tíðindi
17.05 Vikuskiftið - Suni Merkistein leggur til rættis
18.00 Fríggjakvøldstónar - Birgar Johannesen velur løgini
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Villar víddir - Studio Pegasus skipar fyri
20.00 Estudio 2000 - Kári Annand Berg stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Femja Petersen leggur til rættis
22.00 Tíðindi

**Rás**

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár. Innsløg, prát og tónleikur. Sonne Smith leggur til rættis.
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:30 Ynskiløtan - Heilsanir frá lurtarum. Send heilsanir um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur. Sonne Smith leggur til rættis.
16:00 HB - Rásin - Sending um og við fólki frá ítróttarfelagnum HB.
17:00 Tónleikur
18:00 Tíðindi og kunngerðír
18:15 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
21:30 Tónleikur
00:00 Liðugt

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
14.00 Brot og bitar (e)
14.30 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna v/ Símun Absalonsen og Jógvan Zachariassen
16.30 Tónleikur
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan - Biðji verður fyri bønarevnunum
19.00 »Jesus og eg« Barnasending v/ Stellu Zachariassen
20.00 »Jesus Revolution« við Alex O'Campo
22.00 Tónleikur
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskráin fyri leygardag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
6.00 Vit gevast